# Trý skip á Tvøroyri við svartkalva

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Trý skip hava landað svartkalva á Tvøroyri hesa vikuna.

Týsdagin var Anita inn við góðum 44.000 pundum, og mikudagin var Oknin við 24.000 pundum. Djúpvatnstrolarin, Brestir, var eisini inni mikudagin við 130.000 pundum av svartkalva.

Anita og Oknin royna við gørnum undir Føroyum, meðan Brestir hendan túrin var í Grønlandi.

## Alt skorið

Á Fiskavirking á Tvøroyri verður svartkalvin bæði skorin til flak og skráskorin og fer tískil virkaður av landinum.

Teir, ið kappast við virkið á Tvøroyri um at keypa svartkalvan, er eitt nú Fiskasølan, sum sendir fiskin óvirkaðan av landinum og Farex.



*Hesa vikuna hevur Fiskavirking á Tvøroyri tikið ímóti hampiligum nøgdum av svartkalva*

# Tónleikacafé í Pakkhúsinum við stásiligum klaveri

**Jóansøkan í Vági hevur ymiskt at bjóða teimum, ið hava hug til tónleikin. Pakkhúsið hevur fingið stásiligt klaver, ið ger tað møguligt at bjóða allari tónlist í húsið. Á jóansøku er tónleikacafé í Stóra Pakkhúsið**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Um jóansøkuna verður skipað fyri tónleikacafé í Stóra Pakkhúsið fríggjakvøldið og sunnukvøldið. Har fara Claus Telling, klaver, og Guðrun Jacobsen, sang, at framføra. Eisini fara Tróndur Enni og Rúni Eysturlíð at framføra. Teir eru báðir undir tónleikaútbúgving Íslandi og spæla javnan har.

## Stásiligt klaver

Ein vandi hjá mongum plássum í útjaðaranum er, at hóskandi ljóðføri eru ikki at bjóða vitjandi tónleikarum. Í Suðuroynni hevur tað bert verið klaverið í Trongisvági, ið hevur staðið mát, tá talan hevur verið um, at eittnú Norðurlandahúsið sendir ut tónleikarar at leika.

Nú hevur eydnast Stóra Pakkhúsið at fáa stásiligt klaver. Hetta er hent í samstarvi við Claus telling, ið er útbúgvin tónleikari og giftur prestinum í Vági, Marianne Telling. Tað hevur eydnast at fáa eitt stásiligt ljóðføri til rímuligan penga, so nú er gjørligt hjá Vágbingum at hýsa alskins tónleikatiltøkum. T.d. eru ætlanir um framførslur í samband við Summartónar 2002, og hetta hevur ikki verið møguligt áður.

Men fyrst er tað jóansøkan, ið er á skránni. Og óivað verður hugnaligt at leita sær á tónleikacafé í Pakkhúsinum.



*Í stóra Pakkhúsið í Vági stendur nú stásiligt klaver, so nú ber til at hýsa alskins tónleikatiltøkum. Á jóansøku verður tónleikacafé*

*Mynd: D. Olsen*






Sjálvmorðsbumbur:

# Órógva ikki ferðavinnuna

**Ferðavinnan í Ísrael hevur verið fyri stórum bakkasti, síðan stríðið við palestinar av álvara herdist. Nú royna ísraelar at fáa ferðavinnuna aftur á rættkjøl. Í hesum sambandi er ísraelski ferðavinnustjórin fyri Norðurlond í Føroyum, og hann heldur, at tað er trygt at ferðast í ávísum pørtum av landinum**

FERÐAVINNA
*Stefan í Skorini*



*Nir Raz er farin á reklamurundferð í Norðurlondum. Hann heldur, at tað er rímiliga trygt at ferðast í Ísrael, hóast spenta støðan við palestinar hevur havt við sær, at talið av ferðafólki úr Vesturheiminum er minkað munandi*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Stjórin í ísraelsku ferðavinnuskrivstovuni í Norðurlondum er í Føroyum í hesum døgum og roynir at selja føroyingum, ið hava hug at fara til tað krígsherjaða landið, Ísrael.

Stjórin, sum eitur Nir Raz, hevur sjálvur tikið stig til henda túrin, og hann væntar, at føroyingar fara at taka væl ímóti tilboðum úr Ísrael.

– Ísraelar eru í eini sera truplari støðu í hesum døgum. Vit eru fyri álopi hvønn dag, og myndin, sum útheimurin fær av Ísrael, er kríggj, kravgongur, stríðsvognar og sjálvmorðsbumbur, sigur Nir Raz.

Hann vil tó vera við, at hetta er ein ov einstáttað mynd av landinum. Hann leggur dent á, at alt landið als ikki er merkt av krígnum, men at ávísir partar eru tryggir at ferðast í.

– Vit vilja fegin vísa umheiminum, at Ísrael hevur nógv at bjóða ferðafólki. Vit hava til dømis vakrar strendur, Deyðahavið og gestablíð fólk, sigur Nir Raz, sum er farin á reklamurundferð í Norðurlondum.

Hann vísir á, at seinni í ár hava fleiri bólkar bílagt ferðir til Ísrael. Hetta eru fólk úr øllum Norðurlondum, sum hava hug at ferðast í Ísrael. Hann heldur, at hetta er eitt tekin um, at fólk kenna seg trygg við at ferðast til Ísrael, um man heldur seg til tey friðarligu økini.

## Minkandi ferðavinna

Ferðavinnan í Ísrael er minkað við einum helmingi síðan støðan millum Ísrael og palestinar av álvara gjørdist spent. Tó hevur innanlands ferðavinnan tikið seg nakað fram, og hetta hevur við sær, at ísraelska ferðavinnan ikki er so meint rakt av stríðnum.

Nir Raz leggur sera stóran dent á, at teir palestinsku sjálvmorðsbumbufólkini ongantíð enn hava lagt seg eftir at raka ferðavinnuna í Ísrael. Tí kunnu ferðafólk kenna seg hampuliga trygg við at ferðast í ávísum pørtum av landinum.

– Ísraelar kenna seg mangan avbyrgdar frá framkomna heiminum, tí tosað verður um at boykott og handilsstongsul, men vit hava nógv annað at bjóða enn kríggj og sjálvmorðsbumbur, sigur hann.

## Sharon er rætti maðurin

Nir Raz nýtti nógva tíð at greiða fjølmiðlafólk frá støðuni í landinum. Hann heldur, at Ariel Sharon er rætti maðurin hjá Ísrael í løtuni.

– Sharon ger tað besta, sum hann kann, fyri landið í júst hesi støðuni. Hann er tann besti maðurin hjá okkum í hesum døgum, tí vit eru fyri so grovum álopum, men eingin friður er tó í eygsjón, sigur Nir Raz, sum fyrr hevur verið í ísraelska herinum.

Hann heldur, at størsti trupulleikin er í palestinsku leiðsluni, sum stuðlar teimum felagsskapum, ið skipa fyri yvirgangsatsóknum ímóti Ísrael, sambært ferðavinnustjóranum.

Hann tekur undir við sjónarmiðum amerkanska forsetans, sum ikki heldur, at Yasser Arafat er rætti maðurin at leiða tað palestinska fólkið.

Hann vil eisini vera við, at ein stórur partur av tí peningaligu hjálparveitingini, sum verður latin palestinum úr Evropa og Vesturheiminum, als ikki fer til hjálpartiltøk men til onnur endamál.

– Vónandi fáa vit frið í landinum ein dag, men sum nú er mugu vit útihýsa palestinum úr Ísrael, tí sjálvmorðsbumbumenn sleppa ov lætt inn í landið.

# Føroyakvøld á Bakka

**Fríggjakvøldið verður stórt føroyakvøld í kappróðrarneystinum á Bakka á Glyvrum**

TILTAK
*Stefan í Skorini*



*Stórt føroyakvøld verður í kappróðrarneystinum á Bakka á Glyvrum fríggjakvøldið. Eysturoyar Kunningarstova skipar fyri tiltakinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er Eysturoyar Kunningarstova, ið skipar fyri tiltakinum. Líknandi kvøld var seinasta vikuskiftið á Selatrað, og undirtøkan var góð við stórari uppmøting.

Á skránni komandi fríggjakvøld verður felagssangur, upplestur, føroyskur dansur og nógvur sera góður føroyskur matur.

– Ofta halda vit, at føroyakvøld bert er fyri ferðandi í Føroyum, men so er ikki. Eitt slíkt tiltak kann eins væl vera fyri føroyingar í Føroyum, ið hava hug at fara út ein túr og fáa ein góðan bita og eina øðrvísi uppliving, siga fyrireikararnir.

Tiltakið verður fríggjakvøldið, og byrjað verður klokkan 19.30. Ætlanin er at enda klokkan 22.30. Kostnaðurin fyri eitt slíkt kvøld er 250 krónur, og atgongumerki fáast á Eysturoyar Kunningarstovu.

# Rætting til setanarrøðu á Sundalagsstevnuni

Av misgáum er eitt navn komið skeivt fyri: Móður áarstovubrøðurnar Janus og Hans A. Djurhuus var Elsa Maria, eisini nevnd Elsa i Áarstovu, og ikki Giljanna, sum sagt varð.

**Jakup Pauli Joensen**